# Fá gjøgnum brotið á hotellinum

**Hotel Hafnia eggjar aftur í ár fólki at trína alment fram á pall í teirri vælumtókti singer/songwriter kappingini,sum endar við finalu 5. november**

SANGKAPPING

– Dugir tú at syngja? Harumframt kanska at spæla gittar ella klaver? Hevur tú kanska gjørt nøkur løg? Tað er oftani tað fyrsta fetið út á tónleikapallin, sum er tað torførasta. Tað krevur sjálvandi sítt at stilla seg fram fyri fólki og framføra løgini, tú einsamallur gjørdi onkra náttina, tá eingin hoyrdi. Fólk hava kanska leingi biðið teg um at royna teg alment, men tað hevur altíð borið til, at komið við onkrari umbering.

Soleiðis siga tey á Hotel Hafnia, sum ógvuliga fegin eggja fólki at koma at spæla alment. Hotelið við Áarvegin hevur nevniliga aftur í ár gjørt av at skipa fyri teirri væl umtóktu singer/songwriter kappingini.



*Kristleif Zachariasen gjørdi gjørt tað. Ert tú næsti vinnarin, spyrja tey á Hotel Hafnia, sum nú fara at skipa fyri singer/songwriter kappingini*

Hetta er triðja árið, at kappingin verður hildin. Tey bæði undanfarnu árini hevur kappingin verið eyðkend av, at bæði púra óroyndir og royndir tónleikarar eru við. Og tað eru ikki altíð royndirnar, ið sigra.

## Væl virkandi gularót

Singer/songwriter kappingin hevur víst seg at vera ein ófør gularót til føroyskar tónleikarar. Eingin er eitt betri dømi um tað enn Kristleif Zachariasen. Púra ókendi kollfirðingurin trein fram í Hafnia Lounge á heysti 2003 sum ein outsideari í einum undanumfari við nógvum góðum sangarum.

Men frá fyrstu løtu av vistu øll í Hafnia Lounge, at her var talan um nakað heilt serligt. Hann sang og spældi seg í finaluna. Men kappingin í finaluni var hørð. Kortini eydnaðist tað Kristleif at vinna kappingina, og við nøkrum upptøkudøgum í skjáttuni byrjaði hansara ferð fram á føroyska tónleikapallinum. Sigast má, at tað higartil hevur gingið rættiliga væl hjá honum. Tað prógvar góða úrslitið á Prix Føroyum ikki minst.

Í fjør var tað tann meira royndi Rókur Jacobsen, ið vann kappingina. Hetta var fyrstu ferð, at hann stóð á palli einsamallur. Tað var eisini fyri at stuðla einum tílíkum tiltaki, at hann meldaði seg til kappingina, segði hann undan kappingina. Og væl hevur hilnast hjá honum á egnum veingjum.

Stendur tað til Hotel Hafnia, verður kappingin framvegis ein klekingarkapping fyri talent í øllum aldursbólkum. Hafnia hevur valt at geva tónleikarum ein møguleika at spæla alment. At gera tað sum eina kapping økir bert um áhugan millum manna og eigur ikki at halda fólki burtur frá at melda seg.

## Trý undanumfør

Eins og undanfarin ár verður kappingin skipað við trimum undanumførum og einari finalu. Undanumførini verða trý fylgjandi leygarkvøld: 15., 22. og 29. oktober. Sjálv finalan verður 5. november.

Luttakararnir skulu spæla trý løg í part. Tvey teirra skulu vera á føroyskum, egin og nýggj, men tað triðja lagið gerst tú sjálvur av, hvat tað skal vera. Dómararnir meta um dygdirnar hjá teimum einstøku luttakarunum, og ein úr hvørjum undanumfari sleppur í sjálvan finaluna.

Vinnarin av singer/songwriter 2005 sleppur at taka upp í einum dygdargóðum upptøkuhøli.

Set teg í samband við Hotel Hafnia á tel. 313233 og melda teg til.


## Vilt tú verða við til vøkstur og menning?

TRYGD er eitt tryggingarfelag í vøkstri, og fyri at styrkja tænastuliðið, søkja vit eftir skaðaviðgerða, sýnsfólki og søluráðgeva.

**Hvør ert tú?**
Í TRYGD leggja vit størsta dentin á persónligar eginleikar og hugburðin hjá tí einstaka starvsfólkinum. Harnæst koma bókligu útbúgvingarnar og fakligi førleikin. Vit ímynda okkum at tey ið sett verða í starv, hava niðanfyristandandi bókligar bakgrundir:

**Skaðaviðgerðin**
Hægri útbúgving frá lærdum háskúla við 3 til 5 ára starvsroyndum.

**Sýnsfólk**
Byggifrøðingur ella handverkaraútbúgving við møguligari eftirútbúgving. Haraftrat arbeiðsroyndir frá byggivinnuni í 3 til 5 ár.

**Søluráðgevin**
Prógv frá Hægri Handilsskúla ella tilsvarandi útbúgving. Haraftrat arbeiðsroyndir innan søluarbeiði.

Felags fyri størvini eru krøvini til persónligu eginleikarnar hjá teimum, ið sett verða:
· Tú skalt kunna arbeiða sjálvstøðugt, samstundis sum tú kanst samstarva og taka ábyrgd
· Tú ert fyrikomandi og hevur lætt við at seta teg í samband við fólk
· Tú ert málsøkin og opin fyri broytingum
· Tú arbeiðir skjótt, skipað og torir at taka avgerðir
· Tú hevur handilsligan sans og hevur eitt munagott tænastusinni
· Tú ynskir framhaldandi at útbúgva teg

**Vit bjóða**
Hóast størvini taka støði í hvør sínum fakliga palli, kunnu tey, ið sett verða, seta sín persónliga dám á arbeiðsliga umhvørvið. Uppgávurnar eru fjølbroyttar og avbjóðingarnar eru nógvar. Høvið er sjálvsagt fyri framhaldandi, persónligari, eins væl og fakligari menning í einum livandi og tvørfakligum umhvørvi. Sum starvsfólk í TRYGD, verður tú partur av áhaldandi menningini av felagnum og tær persónligu dygdir, ið tú hevur við tær inn í felagið, koma at gera sítt til at TRYGD gerst enn sterkari. Størvini verða sett og lønt eftir sáttmála við Finansforbundet.

**Umsóknir og starvssetan**
Størvini ynskjast sett skjótast tilber, men vit eru eisini sinnað at bíða eftir rætta viðkomandi. Skrivlig umsókn, við curriculum vitae og tilhoyrandi skjølum, skal vera okkum í hendi innan 7. september 2005, skal sendast til:

P/F TRYGD
Att.: Ali Celebi
Gongin 7
Postboks 44
110 Tórshavn
Teldupostur: ace@trygd.fo

TEAM85

Trygd · Gongin 7 · Postboks 44 · FO - 110 Tórshavn · Tel. +298 35 81 00 · Fax +298 31 72 11
www.trygd.fo

TRYGD